## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur av suðri. Skýggjað og av og á regn. Hitin millum 8 og 10 stig




**Veðrið leygardagin:**
Hvassur vindur av suðri. Seinni gongur hann upp í vestan og makar vindin til gul. Regn og seinni turt. Hitin um 8 stig




**Veðrið sunnudagin:**
Veksandi til hvassan vind av útsynningi. Seinni hvassur stormur. Skýggjað og av og á regn. Hitin um 8 stig.




**Veðrið mána- og týsdagin**
Framvegis hvassur vindur av útsynningi og óstøðugt. Hitin óbroyttur.

# Miklagarður umbyggjast

**Fruktin í Miklagarði í SMS fer í framtíðini at halda sær betur, sambært stjóranum í SMS, Niels Mortensen. Miklagarður í SMS fer um hálvan januar at broyta Frukt & Grønt deildina, men hóast hon gerst minni, verður hon betur**

UMBYGGING
*Ingrid Bjarnastein*

Vikuskiftini trý og fýra fer ein minni kollvelting fram í Miklagarði í SMS. Frukt og Grønt deildin í handlinum skal nevniliga umbyggjast. Frukt og grønt deildin verður tó minni enn hon er nú, men hon kemur bara at umfata frukt og grønt og ikki nakað annað, sigur stjórin í SMS, Niels Mortensen.

– Vit fara at fáa tað, sum danir kalla »forstøvning«, greiðir Niels Mortensen frá.

– Hetta syrgir fyri, at fruktin og grønmeti heldur sær longur. Nýtt gólv skal eisini leggjast á.

Meginparturin av umbyggingini av frukt og grønt deildini fer fram í vikuskiftinum, og tískil kemur hetta ikki at ávirka sjálvan handilin. Handilin kemur at hava opið sum vant. Tó mugu kundarnir rokna við, at tað verður eitt sindur rokaligt í Miklagarði ta vikuna byggingin fer fram.

*Núverðandi frukt & grønt deildin í Miklagarði verður í næstum umbygd, og fer fruktin at halda sær betur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | ÷5 |
| Halifax | ÷4 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 2 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | ÷7 |
| Keypmannah. | ÷3 |
| Helsinki | ÷6 |
| Moskva | ÷20 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷3 |
| Kiev | ÷5 |
| Bukarest | ÷3 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 7 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 8 |
| Malta | 10 |
| Tunis | 12 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 28 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | - |
| New York | 1 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | - |
| Panama | 31 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | - |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst yvir Danmark mennist og ferðast eitt sindur í ein landsynning. Eitt lágtrýst sunnan fyri Grønland ferðast norðureftir og dýpist.



Eitt hátrýst yvir meginlandinum við einum hátrýstsryggi til Norðsjógvin stendur mestsum í stað og mennist seinni við Bretsku oyggjarnar. Eitt lágtrýst í ein útsynning úr Íslandi ferðast í ein landsynning og mennist. Nýggj lágtrýst ferðast frá Danmarkarstrætinum í ein landsynning og tilhoyrandi brúgvaløgini fara yvir Føroyum vestaneftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/01 kl. 06[00]– 03/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm – mált frá 02/01 kl. 06[00]– 03/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 3,0 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

30. des.: Fullmáni
2. jan.: Mánin næstur jørðini/Jørðin næst sólini
6. jan.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. jan | 10.39 | 23.02 | 09.39 | 22.02 | 09.54 | 22.17 | 00.13 | 12.39 | 01.13 | 13.39 | 08.54 | 21.17 | 07.54 | 20.17 | 10.54 | 23.17 | 11.54 | — | 10.24 | 22.47 | 11.39 | — |
| 5. jan | 11.26 | — | 10.26 | 23.03 | 10.41 | 23.18 | 01.02 | 13.26 | 02.02 | 14.26 | 09.41 | 22.18 | 08.41 | 21.18 | 11.41 | — | 00.17 | 12.41 | 11.11 | 23.48 | 00.02 | 12.26 |
| 6. jan | 00.03 | 12.40 | 11.40 | — | 11.55 | — | 02.03 | 14.40 | 03.03 | 15.40 | 10.55 | 23.32 | 09.55 | 22.32 | 00.18 | 12.55 | 01.18 | 13.55 | — | 12.25 | 01.03 | 13.40 |
| 7. jan | 01.17 | 13.54 | 00.17 | 12.54 | 00.32 | 13.09 | 03.17 | 15.54 | 04.17 | 16.54 | — | 12.09 | 11.09 | 23.23 | 01.32 | 14.09 | 02.32 | 15.09 | 01.02 | 13.39 | 02.17 | 14.54 |

5 707265 100043 >